# Jubileumskapping í borðtennis

Borðtennissamband Føroya verður í hesum døgum 25 ár. Ein partur av hátíðarhaldinum í hesum sambandi er ein stór jubileumskapping, sum verður í Eysturskúlanum um vikuskiftið.

Byrjað verður kl. 9.30, og síðani verður hildið fram gjøgnum dagin. Millum annað við kapping fyri oldboys og -girls, sum verður kl. 12.00.

Seinni um dagin verður almenn móttøka á Listaskálanum, har millum annað Oyl-landsliðið verður heiðrað fyri framúr úrslitini, sum tey fingu á Oyggjaleikunum í summar.

Móttøkan í Listaskálunum verður klokkan 16.

**-mørk**

Neistin-VÍF 28-17 (12-7):

# Ruddiligur Neista-sigur

**Kvinnurnar hjá Neistanum góvu ikki VÍF stórvegis møguleika, tá liðini hittust í gjárkvøldi**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tá liðini hittust í Vestmanna í fyrsta landskappingardystinum, gjørdist talan annars um ein munandi meira spennandi dyst, enn tey flestu høvdu roknað við. Ta ferðina vann Neistin tepurt við trimum málum, eftir at VÍF leingi hevði havt gott tak á. Og ta søguna vildi Neisin ikki hava aftur mikudagin.

Frá byrjan settu tær bláu seg væl og virðiligi á dystin, og tó at Ioana Rápa royndi at fylgja við í málskjótingini, so megnaði hon ikki heilt at fylgja hesum. Og tá Neistin so eisini setti skotsterka lámin út av spælinum, var ikki nógv eftir at gera hjá VÍF. Tær bláu togaðu seg alt meira frá, og sum seinni hálvleikur leið, gjørdist talan mest sum um stórsigur.

Hesin hevur í fyrstu atløgu flutt Neistan ájavnt við Stjørnuna í oddinum á stigatalvuni, tó at tær bláu hava ein dyst fleiri.

VÍF er við tapinum framvegis á fimta plássi í kappingini.

### Fakta um dystin

**Neistin-VÍF 28-17 (12-7)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Ása á Neystabø 8, Mildrið Jacobsen 6, Nicoleta Radu Hansen 5, Annika Ljósstein 4(1), Kára á Dunga 2, Annika Thomsen 1, Rakul Augustinussen 1, Gunnvá Brockie 1
**VÍF:** Ioana Rápa 5(1), Finngerð Jensen 4, Sóley Mikkelsen 3, Jacklin Durhuus 2, Fríða Marjunardóttir 1
**Brotskøst:** Neistin 2, VÍF 2
**Útvísingar:** Ongar
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Petur Skeel Dahl

Mjølnir-SÍ 1-3 (23-25, 23-25, 15-18, 21-25):

## SÍ vann í Klaksvík

Talan gjørdist um sera tætta uppgerð, tá sørvingar vitjaðu í Klaksvík í meistaradeildini hjá monnum. Mett eftir dystunu higartil í kappingini, so var SÍ kanska favorittur. Men í gjárkvøldi var tó um reppið, at Mjølnir streyk avstað við stigunum. Bæði í fyrsta og næsta settinum vóru tað bara tveir bóltar á muni, og tá Mjølnir so tók triðja settið, varð spenningurin heilt stórur.

Tað eydnaðist tó SÍ at køva hendan, tá teir í fjórða settinum fingu skapt eitt hol niður, og við 25-21 í hesum settinum vissaðu teir sær enn tvey sti, soleiðis at teir nú eru einsamallir á øðrum plássinum á stigatalvuni.

**-mørk**

Flogbóltsstøður - Meistaradeild, kvinnur

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 SÍ | 4 | 3 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 TB | 4 | 2 | - | 2 | 8 | 6 | 2 | 4 |
| 4 Mjølnir | 4 | 2 | - | 2 | 6 | 9 | -3 | 4 |
| 5 ÍF | 5 | 1 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 2 |
| 6 KÍF | 5 | 0 | - | 5 | 4 | 15 | -11 | 0 |

Meistaradeild, menn

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 5 | 5 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 SÍ | 4 | 3 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 ÍF | 5 | 2 | - | 3 | 10 | 11 | -1 | 4 |
| 4 Mjølnir | 4 | 1 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 2 |
| 5 Nøvan | 4 | 0 | - | 4 | 0 | 12 | -12 | 0 |

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 230 | 144 | 86 | 14 |
| 2 Neistin | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 243 | 175 | 68 | 14 |
| 3 Kyndil | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 176 | 173 | 3 | 12 |
| 4 VB | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 160 | 106 | 54 | 10 |
| 5 VÍF | 10 | 4 | - | 0 | - | 6 | 238 | 243 | -5 | 8 |
| 6 StÍF | 8 | 3 | - | 0 | - | 5 | 190 | 204 | -14 | 6 |
| 7 Søljan | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 138 | 218 | -80 | 2 |
| 8 Tjaldur | 9 | 0 | - | 0 | - | 9 | 154 | 266 | -112 | 0 |

# Rok í Istanbul




*Longu á veg í spælaratunnilin sóust turkiskir og sveisiskir spælarar í hornatøkum*

*Mynd: Reuters*

**Tað gekk harðliga fyri seg, tá dysturin millum Turkaland og Sveis var liðugur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

FIFA-forsetin, Sepp Blatter, er sjálvur úr Sveis, og hann var ikki mjúkur at strúka, tá søgurnar fóru at ganga um tað, sum fyrifórst eftir dystin í Turkalandi.

- Tað eru slíkar hendingar, sum gera meg í øðini. Tær hava einki sum helst at gera í fótbóltsheiminum, og tað er einki at ivast í, at talan verður um harðar revsingar, staðfesti FIFA-forsetin.

»Helviti á jørð« verður ofta sagt um áskoðarafjøldina, sum vitjandi liðini hitta í Istanbul, og tað er einki at ivast í, at sveisku landsliðsspælararnir heldur enn gjarna vilja sleppa undan Turkalandi, tá lutakastið til komandi EM-undankappingini verður í januar mánaði.

Tí tað, sum gekk fyri seg eftir dystin, var snøgt sagt bannað fyri børn. Sjálvandi fegnaðust sveisisku spælararnir, tá dómarin hevði blást fyri seinastu ferð. Men tað gingu bert fá sekund, áðrenn teir sóust rennandi móti spælaratunlinum.

Orsøkin var, at áskoðararnir tá vóru í holt við at tveita alskyns lutir á vøllin eftir spælarunum, men hóast spælararnir komu undir heilt, var ikki trygt fyri tað.

Talan gjørdist nevnliga um satt rok millum spælararnar hjá báðum liðunum. Og sambært sveisiska venjaranum, Jakob Kuhn, helt løgreglan seg heldur ikki aftur í bardaganum.

Ringast stóð til hjá Auxerre-verjuspælaranum, Stephane Grichting, sum noyddist á sjúkrahúsið, eftir at verða sparkaður. Men eisini Johan Vogel (AC Milan), Benjamin Huggel (Frankfurt) og málmansvenjarin, Erich Burgener, fingu smærri løstir.

Eftir dystin mátti sveisika landsliðið bíða í fleiri tímar í skiftirúmuninum, áðrenn tað varð mett ráðiligt hjá teimum at fara móti flogvøllinum.

Enn er ikki greitt, hvørja revsing talan verður um. Boðini úr FIFA eru tó, at hetta skal vera greitt, áðrenn sjálvt HM-lutakastið verður tann 9. desember.

# Daiva sleppur at koma seinni

**Litaviski landsliðsvenjarin hevur givið VB-spælaranum loyvi at koma nakað seinkað til EM-undakappingina**

LANDSLIÐSSPÆLARI
*Jákup Mørk*

Hesum hevur VB boðað frá á heimasíðu sínari.

Hetta merkir, at Daiva Toumaite hóast alt fær møguleikan at spæla EM-undankappingardystir fyri Litava.

Í fyrstu atløgu hevði hon annars givið avboð, tí hon við hesum hevði mist týdningarmiklu dystirnar móti Stjørnuni og Neistanum, men nú hevur venjarin sagt tað vera í lagi, um hon kemur mánadagin.

EM-undankappingin verður spæld í Portugal í døgunum 21. til 27. november.